# enniskju og djór í Havnardali



*Djóralæknin sera fegin um nýggja fjósið*

ur eri eg ómetaliga glaður, nú vit síggja úrslitið av stríðnum. Hetta hevur verið ein tung prosess, serliga at fáa fíggingina uppá pláss. Men hetta er so størsta løtan – at síggja fyrstu neytini koma inn í teirra nýggja heim. Neytini skulu sjálvandi venja seg til nýggju umstøðurnar, og tað fara vit at læra tey komandi vikurnar.

Og við hesum ynskir Miðlahúsið teimum fýra bóndafamiljunum og føroyskum landbúnaði góða eydnu víðari.



ur, sum er sonur Tórfinn Dalsgarð. Hann og tveir vinmenn hansara, ein annar Bárður og so Johan høvdu leitað sær í nýggja fjósið hetta góða kvøld. Bárður: -Hetta er gott fyri neytini og fyri okkum. Neytini skulu sjálvandi venja seg til alt hetta nýggja. Tey mugu ikki renna runt men mugu venja seg við fjósið og serliga robottarnar.

Og enn ein forvitin gestur hetta kvøldið var eingin minni enn okkara kæri Poul Mohr, sum elskar kriatúr. Poul Mohr: -Hetta er ótrúliga stuttligt og spennandi at vera við til. Eitt veldugt frambrot. Eg mátti fara út at síggja neytini koma inn i fjósið fyri fyrstu ferð. Vit mugu so vóna, at hetta fer at eydnast. Og tað skal tað.

## Gingið væl

Og áðrenn vit løgdu leiðina aftur til hús á Norðasta Horni fingu vit orð á ein av nýggju eigarunum Tórfinn Dalsgarð: -Tað hevur gingið avbera væl at fáa neytini í fjósið. Nú verður spennandi at vita, hvussu tað fer at rigga, tá neytini ganga leys, og tey skulu mjólkast. Sjálv-